# Skapa móta úr føroysku ullini



**Sirri er ein føroysk fyritøka, ið sniðgevur pløgg av 100% føroyskari ull og er einasta fyritøka, ið endurnýtur føroysku ullina akkurát sum hon er frá natúrunar hond**

Sirri varð sett á stovn í 1999 av Árna og Karini Brattaberg.

Hugtakið var at skapa móta úr føroysku ullini, ið tá vanliga bleiv brend runt Føroya land.

Hjúnini Brattaberg fóru so undur at samla ull inn frá fólki runt um í Føroyum og lótu aftur fyri ein ávísan kg prís.

Nógv Ull kom inn, og tey fóru undir at virka ullina til tógv og pløgg.

Hugskotið aftan fyri Sirri er at gangnýta tað tilfengi, sum er í Føroyum.

Ullin skal nýtast, og úr henni skal ein vøra gerast, sum er nakað serstakt, og sum fær ein serligan týdning fyri brúkaran.

Fyrsti Sirri handil kom í Tórshavn í 2000 og lá á Áarvegnum.

Í dag finnist Sirri kring allan heim, so sum Føroyum, Danmark, Svøríki, Noregi, Íslandi, Grønlandi, Týsklandi, Ruslandi, Japan, USA osv.

Sirri vøran er vistfrøðilig og verður skapað úr føroyskari ull, ið tann føroyski seyðurin kastar av sær um várið.

Sum nú er hava vit fleiri enn 150 ymisk pløgg at velja ímillum, og tey eru at finnna í einum ella fleiri av teimum fimm grundlitunum, ið føroysku seyðirnir hava. Hettar merkir, at hvørki ullin, tógvið ella pløggini verða litað.

Í oktober 2007 sluppu David Nordendal og Óluva á Lofti uppí part.

Sirri handilin í Tórshavn fekk annan dám. Sum nakað nýtt komu aðrir føroyskir sniðgevar inn, so sum Malan á Lofti, Barbara í Gongini og Jóhanna av Steinum.

Hettar var nakað nýtt og annarleiðis - »alt tað føroyska á einum stað«.

Sirri fer í famtíðini at leggja sera stóran dent á design og sjálvandi góðsku. Vit hava tvær árligar kollektiónir, eina summarkollektión og eina vetrakollektión. Eisini er týdningarmikið hjá okkum at fáa fram, at øll pløgg framleidd av Sirri eru vistfrøðislig.

Í tiltakinum LIVA, ið verður í Klaksvík, er Sirri eisini við í. Har verður dentur lagdur á framtíðar móta, vælveru og heilsu. Nakað, ið Sirri setur sera høgt á sínum skala.

So at verða við í tiltakinum LIVA er sera hókandi fyri Sirri, ið leggur stóran dent á júst tað, ið tiltakið setur fokus á MÓTA,VÆLVERU og HEILSU.

www.monroe.fo



AVEDA
the art and science of pure flower and plant essences

Hárviðgerðir Andlitsviðgerðir Mýking & Spa Make-Up







Hárlist
HANSA VEST
Tel. 45 96 00 / 22 20 90

Vælverustovan Monroe
Tel. 42 27 44
Elisabeth M